# ítróttur

Nr. 75 • leygardagur • 20. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Seinasta umfarið skal avgreiðast

**Um vikuskiftið skal endaliga gerast av, hvørji lið koma víðari til fjórðingsfinalurnar í steypakappingini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Bólkaspælið í steypakappingini er nú um at vera liðugt, og tó at nakrir spurningar longu eru avgreiddir, so er framvegis nógv eftir at spæla um hjá flestu liðunum.

Tað eru nevnliga bert GÍ og HB, sum eru vís í oddasessunum í sínum bólkum, meðan tað hinvegin bert er Sumba, sum einki hevur at spæla fyri. Fyri hini 9 liðini í bólkaspælinum er talan sostatt um dystir, sum kunnu avgera víðari lagnuna í bólkaspælinum.

## NSÍ væl fyri

Í bólki 1 eru tey trý, B36, VB og NSÍ vís í at koma víðari, men enn stendur opið, í hvørjari raðfylgju hetta verður. Nakað sum kann koma at hava avgerandi týdning, tí vinnararnir í bólkaspælinum saman við besta 2'aranum fáa heimavøll í fjórðingsfinaluni – og í øllum førum á pappírinum verður mótstøðan tá veikari.

Her hevði B36 møguleikan at tryggja sær oddasessin seinasta vikuskiftið, men tapið fyri NSÍ koppaði í nógvar mátar alt á høvdið hjá havnarliðnum, tí er kravið í øllum førum eitt stig, tá teir fara til Vágs. Fær B36 stig her, verða teir besti 2'arin í bólkinum, meðan VB hinvegin tekur hendan sessin, um teir vinna dystin.

Fyri bæði VB og B36 er eisini galdandi, at tey við einum sigri kunnu fara framum NSÍ, men tað krevur so, at runavíkingarnir ikki fáa fulla úrtøku úr sínum báðum dystum móti Sumba. Hin fyrri av hesum varð útsettur, men varð leiktur fríggjadagin eftir evstamark okkara, meðan seinni dysturin, eins og tann millum VB og B36, verður leiktur sunnudagin.

Og í veruleikanum eru runavíkingarnir somikið væl fyri, at teir eisini hava ráð at tapa annan dystin móti Sumba. Við einum sigri – og harvið 10 stigum íalt – kunnu teir nevnliga tryggja sær, at teir verða besti tvey'arin í bólkaspælinum.

## Alt er opið

Sum sagt, so er GÍ annað av teimum liðunum, sum longu hevur ognað sær fremsta sessin í sínum bólki, og hetta kann hugsast at geva mótstøðumonnunum úr EB/Streymi ein lítlan fyrimun, tá teir koma til Gøtu leygardagin. Tað er í øllum førum ikki óhugsandi, at gøtumenn nú royna at spara eitt sindur upp á spælarar, sum møguliga hava smærri skaðar at dragast við. Ikki minst, tá talan fyri GÍ er um ein týdningarleysan dyst, meðan mótstøðumenninir hinvegin helst vilja leggja alla orku í at vinna sær tey trý neyðugu stigini.

Hesi eru nevnliga neyðug hjá EB/Streymi, sum er ájavnt í stigum við TB og FS Vágar á øðrum plássinum. Hesi bæði seinnu nevndu skulu dystast á Sevmýri, og fyri báðar partar er tá galdandi, at meðan ein sigur helst ber víðari luttøku við sær, so merkir eitt tap eftir øllum at døma eitt farvæl, so í øllum førum verður talan um kontanta avrokning.

## KÍ undir trýsti

Klaksvíkingar fara helst við bivandi hjarta inn á Toftir, tá KÍ skal spæla ein rættiliga "alt ella einki" dyst móti B68.

Einasti sigurin hjá KÍ í bólkaspælinum kom til høldar í heimadystinum móti B68, men hetta hevur langt ífrá verið nóg mikið hjá høgt-stílandi klaksvíkingunum. Tap á heimavølli fyri HB og bæði úti og heima ímóti Skála hava viðført, at KÍ nú er á aftasta plássinum í bólkinum, , og alt annað enn ein sigur er at rokna fyri einki hjá KÍ, sum tá endar aftast. Hinvegin kunnu teir við einum sigri vinna oddasessin í bólkinum, treytað av, at Skála einki fær burtur úr sínari vitjan í Havn.

Tað átti Skála kanska heldur ikki at havt so góðan møguleika fyri á pappírinum, men støðan hjá HB er hin sama, sum hon er hjá gøtumonnum í bólki 2. HB hevur longu ognað sær fremsta sessin í bólki sínum, og tí hava teir ikki fyri neyðini at leggja so øgiliga orku í dystin, og eins og hjá GÍ, so fer venjarin neyvan at tveita nakran av føstu leikarunum á vøllin, um so er, at teir hava minsta varhugan av, at hetta kann kosta leikaranum nakrar vikur uttan fyri síðulinjuna, so alt í alt er uppgávan hjá Skála kanska ikki heilt vónleys.

Hvussu verður og ikki, so kann í øllum førum staðfestast, at bólkaspælið í ár hevur verið eitt hitt mest spennandi, hesi árini, sum steypakappingin hevur koyrt eftir nýggja leistinum. Ikki ein av dystunum í seinasta umfarinum er uttan týdning, bara tað í sjálvum sær borgar helst fyri, at leikararnir leggja nógv í uppgávuna, sum nú liggur fyri framman.

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

### Bólkur 1

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 3 - 1 - 1 | 17 | 4 | 13 | 10 |
| 2 | VB | 5 | 3 - 0 - 2 | 12 | 10 | 2 | 9 |
| 3 | NSÍ | 4 | 2 - 1 - 1 | 8 | 5 | 3 | 7 |
| 4 | Sumba | 4 | 0 - 0 - 4 | 3 | 21 | -18 | 0 |

### Bólkur 2

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 5 | 3 - 2 - 0 | 11 | 5 | 6 | 11 |
| 2 | EB/Str. | 5 | 1 - 2 - 2 | 7 | 8 | -1 | 5 |
| 3 | FSV | 5 | 1 - 2 - 2 | 5 | 7 | -2 | 5 |
| 4 | TB | 5 | 1 - 2 - 2 | 8 | 11 | -3 | 5 |

### Bólkur 3

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 5 | 4 - 1 - 0 | 14 | 6 | 8 | 13 |
| 2 | B68 | 5 | 2 - 0 - 3 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| 3 | Skála | 5 | 2 - 0 - 3 | 7 | 12 | -5 | 6 |
| 4 | KÍ | 5 | 1 - 1 - 3 | 10 | 12 | -2 | 4 |



*Hóast runavíkingar enn ikki hava ognað sær fyrsta plássið í bólkaspælinum, so kunnu teir við trimum av seks møguligum stigum móti Sumba tryggjað sær, at teir í øllum førum hava heimavøll í fjórðingsfinaluni*








# Áskoðaramet hjá FCK

**Høvuðsstaðarfelagið fer væntandi upp um 300.000 heimaáskoðarar í komandi heimadystinum, og til dystin móti Brøndby er alt útselt**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Higartil hetta kappingarárið hava í alt 289.727 áskoðarar verið til teir 19 heimadystirnar, sum FCK hevur leikt, og longu nú er greitt, at talan heilt víst verður um metstórt áskoðaratal hjá felagnum.



*Eftir øllum at døma verður talan aftur um fult hús, tá FCK og Brøndby hittast í Parkini, og longu nú er greitt, at árið í ár verður metár hjá FCK, hvat áskoðarum viðvíkur*

Áskoðari nummar 300.000 verður væntandi latin inn gjøgnum dyrnar í Parkini sunnudagin, tá Silkeborg kemur á vitjan, tí sum gongdin hevur verið seinastu dystirnar, og møguleikarnir fyri enn einum DM-gulli økjast, er áhugin fyri FCK mest sum eksploderaður.

Longu nú hevur FCK eisini boðað frá, at fult hús verður, tá Brøndby hin 12 mai kemur á vitjan í einum dysti, sum aftur í ár tykist verða finalan um, hvør rennur avstað við gullinum.

Heilt útselt er tó kortini ikki í Parkini. Enn er eitt leyst atgongumerki, og hetta fer hepni vinnarin av kappingini hjá Sosialinum og Atlantic Airways at fáa.

## Dystir um vikuskiftið

### Fótbóltur

### Kappingin um Løgmanssteypið

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 19.04 | NSÍ-Sumba | Suni Johansen |
| 21.04 | VB-B36 | Lassin Isaksen |
| 21.04 | Sumba-NSÍ | Birgir Sondum |

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 20.04 | GÍ-EB/S | Suni Johansen |
| 20.04 | TB-FSV | Petur Skarðenni |

Bólkur 3

| | | |
|---|---|---|
| 20.04 | B68-KÍ | Páll Augustinussen |
| 20.04 | HB-Skála | Jens Petur Brattalíð |

### Steypakappingin, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 21.04 | KÍ-B68 | Dan Højgaard |
| 21.04 | HB-NSÍ | Jóhan Krogh |
| 21.04 | B36-AB | Erling Eysturoy |
| 21.04 | VB-B71 | Jens Petur Brattalíð |

# Vejle vann kæruna

**DBU gav Vejle viðhald og trý stig í málinum um dystin móti OB**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Vejle fekk hóskvøldið trý sera týdningarmikil stig í stríðnum fyri at yvirliva í bestu donsku røðini. Fyrr í vikuni skrivaðu vit, at Vejle hevði kært dystin móti AB, sum Vejle annars tapti greitt, og nú hevur DBU givið felagnum viðhald í kæruni.

## Ov nógvir útlendingar

Orsøkin til, at Vejle sendi kæru inn, var, at AB eitt skifti hevði fýra ikki-ES borgarar á vøllinum. Sambært galdandi fótbóltsreglunum er hægst loyvda talið av ikki-ES borgarum tríggir.

Við hesum heldur DBU fast um grundreglur sínar, sum millum annað vórðu staðfestar, tá spæliloyvið hjá Jákupi Mikkelsen í 1996 varð liggjandi eftir í Klaksvík, har hann hevði givið eina hjálpandi hond, meðan hann annars hevði frí í Herfølge.

Tað ferðina hevði Herfølge annars vunnið útidyst móti AGF, men mistakið førdi við sær, at Herfølge misti trý stig, og í seinasta enda viðførdi hetta eisini, at AGF vann seg upp um Herfølge, og fór avstað við bæði silvurkrónum og atgongumerki til europeiskan fótbólt.

Týdningurin av stigunum, sum Vejle, nú hevur fingið, kann eisini vísa seg at gerast sera stórur. Sigurin viðførdi, at Vejle nú hevur 26 stig. Liðini undir teimum á stigatalvuni eru Silkeborg, AGF og Lyngby, sum hava ávíkavist 25, 22 og 14 stig.